# Nú er Lopra Føroya nalvi í 45 dagar



*Hans Olav Andersen er næsti granni boriplássið. Hann heldur at hetta er spennandi og vónar, at tað kann verða byrjanin til eina oljuvinnu á sjónum undir Føroyum. Oljumenninir bara eta og sova so teir síggjast ikki í bygdini uttan til og frá arbeiði, sigur hann.*

*Nú er tað Lopra, sum er miðdepilin. Lopra er Føroya nalvi eina løtu. Boringina hava vit hoyrt nokk um. Vit hava tikið pulsin á meiniga manninum í Lopra at vita, hvat hann heldur um alt hetta, sum nú fer fram beint uttanfyri eingjargarðarnar*

Áki Bertholdsen
Áki Hermansen

Nú er Lopra høvuðsstaður Føroya.

Henda litla fortjónaða bygdin á suðurarminum á Vágsfirði hevur einki fótbóltslið og einki flakavirki at seta seg á Føroyakortið.

Men í 45 dagar verður hon týdningarmesta bygd í Føroyum kortini, tí hesar dagarnar hevur hon nakað, eingin onnur bygd í Føroyum hevur. Eitt djúpt hol, sum ger hana til Føroya nalva eitt ælabittið bil í søguni.

Tað er ikki sørt, at borivirksemi hevur sett síni spor í gerandisdagin hjá teimum 105 fólkinum, sum búgva í Lopra.

Við sínum 60 metrum upp í loft loypur boritornið í eygunt og tað, sum skal fara er tað stóra samtaluevnið, ikki bara í Lopra, men í allari oynni og helst um landið alt.

**Undir Oljufjallinum**

Í Lopra eru nýggjar tíðir og tað hevur eisini sett sín dám á prátið, men tað er ikki bara álvara.

Boritornið stendur beint undir tí 235 metra høga Kirviskolli, sum hittinorð aðrir suðuroyingar longu hava eyknevnt við tí bibilska navninum Oljufjallið.

Eitt høvuðsfelag í boringini í Lopra er DONG.

Og hetta er aðru ferð, at tað er ov mikið at dong í Lopra.

Í Lopra er gomul hvalastøð og ein tvøstbiti á størhvali eitur eisini dong. Tað var ein tiltikin góður og feitur biti og teir hava hildið fyri, at hevði bara dong roynst teimum líka væl hesuferð, sum hinuferð.

**Startskotið**

Boringin í Lopra er startskotið til eina komandi oljuvinnu í Føroyum.

Tað er fyrsta boringin við atliti til eina komandi oljuvinnu.

Tað er í hvussu so er vónin, vit kroykja okkum í og seta okkara álit á fyribils.

Mikudagin varð arbeiðið líkasum alment sett í gongd, hóast tað ikki gekk akkurat sum ætlað, tí alt var ikki reiðiliga klárt enn.

Men henda dagin vóru tíðindafólk, donsku feløgini, sum standa fyri arbeiðinum og føroyska oljufyrisitingin í Lopra og skoðaðu verkið.

Og tað var ikki sørt, at eisini lopransfólk hildu at hetta var ein hátíðardagur.

Flaggini í bygdini vóru vundin í húnarhátt og tá ið fregnaðist hví, fingu vit at vita, at tað var til heiðurs fyri tí, sum nú skuldi fara fram fyri dyrnar hjá teim-

—

**Spennandi at fylgja við**

Jú hetta er spennandi at fylgja við í, sigur Hans Olav Andersen í Lopra.

Hann er næsti granni borihólinum og vit gjørdu eitt lop fyri til hansara at vita, hvat meiniga maðurin í Lopra helt um alt hovastakið.

Hann sigur, at hetta er ein spennandi tíð í Lopra. Og tað er ikki fritt, at fólkið setir stórar vónir til tað, sum fer fram. Ikki til, at olja finst í Lopra, men til, at hetta skal vera byrjanin til eina oljuvinnu til havs undir Føroyum.

– Fólkið her er ógvuliga áhugað í tí, sum fer fram, sigur hann og tað er ikki fritt, at gonguturarnir hjá Lopransfólkið verða lagdir framvið boritorninum heldur størri mun nú enn fyrr.

Hann ser serliga hugtikin av monnunum, sum hava sett boran saman.

– Arbeiðið gongur ótrúliga skjótt. Tað er týðiligt, at hesir menninir vita, hvat teir gera. Hetta er ikki fyrstu ferð, teir seta eitt boritorn saman. Teir eru sera dugnaligir, sigur Hans Olav.

Hann sigur, at annars sæst ikki so nógv til monnunar.

Teir bara arbeiða og sova.

– Arbeitt verður í tveimum vaktum alt døgnið, sjey dagar um vikuna. Og tá ið teir hava frí, sova teir.

– Tað einasta vit leggja merki til teir uttanfyri boriplássið er, tá ið vaktarskiftið er, og tá ið teir fara í bygdarhúsið at at fáa sær at eta.

Og so er tað bílaferðslan, hon er nógv vaksin í Lopra hesar dagarnar, tí tað koyra til og av boriplássinum alt døgnið.

Annars síggjast teir ikki í bygdini.

**Upp klokkan fimm**

Tað er mangan ført fram, at hetta er ikki ein oljuboring og at tað er ov tíðliga at fáa dollartekin í eygun, tí tað er ikki fyrrenn seinni at pengar, pengar eru at forvinna – við tí fyrivarni, at tað er annað enn bláur roykur í undirgrundini.

Men tað er kortini ikki heilt sørt, at tað dryppar á lopransfólk.



*Eisini óvitarnir taka eitt tak. Hesir hampa túnið rundanum bygdarhúsið fyri oljumonnunum*


RADIOHVØLPUR
AM & FM
við oyrasnigli
– munin minni
enn stór svávuldós
• á vølli
• á fjalli
• í hjalli
• í hoyna
• í báti



148,-
SPARD KRÓNA ER VUNNIN KRÓNA
pappírslonin
Sverrisgøta 9 • FR-110 Tórshavn
Tlf 10603 • Fax 10806 • Box 195

Millum annað ger bygdarhúsið kvettið.

Flestu oljumenninir eta í bygdarhúsinum og tað er eitt gott ískoyti til raksturin hjá húsinum og hjá teimum, sum gera matin.

– Men tað er eitt sindur strævið at venja seg við at fara upp so tíðliga, sigur Heidi Lisberg, sum stendur fyri matgerðini.

At hjálpa sær hevur hon fingið møðgurnar Tordis og Fanny Nielsen og Finngerð Bech.

- Vit tørna til hvønn morgun klokkan fimm tí klokkan seks eta teir morgunmat.

Klokkan 12 eta teir døgurða og klokkan seks náttyrða. Á miðnátt eta teir aftur, breyð, heita súpan o.s.fr.

Menninir hava tað strævið og teir fáa góðan mat, sum liggur leingi á.

Føroyskan mat fáa teir tó ikki, men fisk hava teir fingið og tað dámdi teimum væl.

**Vanir við útlendingar**

Annars er fólkið í Lopra von at hava við útlendingar at gera.

Hans Olav Andersen sigur, at norðmenn vóru á hvalastøðini fyrr í øldini.

Hon gav nógv arbeiðið.

Miðskeiðis í triatiárunum komu týskarir til Lopra.

Alment komu teir at veiða hval, men veruliga endamál teirra var at kanna eftir, hvat ymiskt av hvali kundi brúkast til í kriggi, t.d. sprongdu teir fleiri loðingar á atløgubryggjuni, sum tá var.

– Men teir løgdu eisini streym til Lopra. Tað er tað einasta, vit her í bygdini hava at takka týskarum fyri, sigur Hans Olav Andersen. Týskararnir fóru heimaftur, tá ið kriggið brast á.

Hvalastøðin helt uppat í fimtiárunum.

Í sjeytiárunum bygdu tveir danir sagverk í Lopra, men tað gekk heldur ikki. Inn ímillum var eisini eitt sildavirki í bygdini, men tað fór sama veg.

Og nú er tað so boriholið.

Hans Olav sigur, at han vónar, at úrslitið av boringini verður gott og at hann hevur tað álit, at arbeiðsplássið er so væl tryggjað, sum gjørligt, tí hóast vandin er ævaraska lítil fyri at nakað hendir so er tað menniskjan slíkt at mistaka seg, og tað er gott at vita, at trygdarútgerð er tøk. Men vónandi fáa vit ikki brúk fyri henni, leggur hann afturat.



*Heidi Lisberg h.m. stendur fyri matgerðini. At hjálpa sær hevur hon Tordis Nielsen. Oljumenninir eru bara fittir at hava við at gera, siga tær.*

*Hetta er eitt kærkomið íkast til raksturin hjá bygdarhúsinum*

**Eitt vónbrot**

Í øllum hesum, sum er farið fram, hevur Hans Olav Andersen eitt hjartasuff.

Hann sigur, at tey eru framvegis vónbrotin av, at Strandferðslan ikki legði farmin upp í Lopra ístaðin fyri í Vági, tí hetta var einasti møguleiki hjá kommununi at fáa eitt lítið sindur burturúr.

– Strandferðslan hevur verið bangin fyri, at brúgvin um eina á í Lopra og vegurin fór ikki at halda.

– Teir vildu heldur ikki koyra tann stóra, tunga kranan norður á Tvøroyri, tí teir vóru bangnir fyri vegnum.

– Eg haldi ikki at teir vita av, at vegurin á Núpi, ímillum Vág og Lopra varð sjunkaður so nógv einaferðina í fimtiárunum, at tað mátti betongast upp fyri í neðra at stuðla uppundir hann. Seinni varð neyðugt at seta jarnboltar í hann, at hefta hann at hann skuldi ikki rapa.

Hans Olav Andersen sigur, at tá ið vegurin á Núpi helt, heldur hann allastaðni.

– Tað hevði einki verið í vegin fyri at lagt farmin upp í Lopra, leggur hann afturat.



*Fanny Nielsen og Finngerð Bech seta á borðið og hjálpa til.*


**Suðuroyar Kunningarstova**

**Opið er hesar dagar:**

Mánadag–fríggjadag kl. 09.00–12.00 og 13.00–16.00
Leygardag kl. 10.00–12.00

**Opið er** í húsinum á Drelnesi, tá ið Teistin og Smyril leggja at.

**Á Kunningarstovuni** ber til at leiga sær eini hús í Suðuroy, keypa ein bátatúr/fiskitúr ella ein gongutúr. Eisini selja vit travelkort, ferðaseðlar til Aberdeen og kunnu hjálpa til við bilegging um av flogferðaseðlum.

**Orsakað av yvirframleiðslu á marknaðinum, fært tú nú**

**RAM**

**FYRI BOTNPRÍSIR!**

Prísdømi:

Samsung 2X32 (60 ns) 8Mb modul - 72 pin

kr. 620,- v/ MVG

MOTOROLA 4X36 (70 ns) 16 Mb modul - 72 pin

kr. 1990,- v/ MVG

COM-DATA PF

Klaksvík - Tlf. 56173 * Tórshavn - Tlf 16173 * Glyvrar - Tlf. 49840